

# Minst 5000 á framsýning

FRAMSÝNING

Um vikuskiftið høvdu næmingarnir í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla framsýning av øllum teimum mongu og ymisku verkunum, teir hava evnað til henda seinasta veturin.

Framsýningin varð opin leygardagin og pálmasunnudag, og væl at fólki vitjaðu framsýningina.

Serliga sunnudagin var nógv fólk á framsýningini.

– Talan var um ein javnan streym av fólki allan dagin, verður sagt.

Mett verður at omanfyri 5.000 fólk vóru í Eysturskúlanum hesar báðar dagarnar.

*sb.*







